## Bjóða seg fram

Tey samkyndu halda, at rættarnevndin hjá Løgtinginum eigur at hava tey við, tá nevndin fer at viðgera uppskotið um at veita teimum samkyndu vernd í revsilógini. Umboðini fyri tey samkyndu skulu vera føroyingar, og eru eingi samkynd í Føroyum til reiðar at vera við í viðgerðini, eru Bogi Dánjalsson Davidsen og Sonja Jógvansdóttir, sum búgva í Danmark, sinnað at koma til Føroya á fund við rættarnevndina.

## Styðja uppskotið

Arbeiðskvinnufeløgini í Havn og í Klaksvík vilja hava Løgtingið at samtykkja uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um at broyta lógina um barsilsskipanina. Í einari áheitan á Løgtingið siga feløgini, at tey tóku undir við barsilsskipanini, tá hon kom, tí hon bøtti munandi um umstøðurnar hjá nýføddum børnum og foreldrum teirra. Uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum fer at gera skipanina uppaftur betri, og tí taka feløgini undir við tí.

# Ein skal hava virðing fyri Tjørnuvíkar-vegnum

**– Tað er næstan ikki dagur, at ikki onkur steinur liggur á hesum vegastrekkinum, sigur Petur Eikholm, økisformaður hjá Landsverki í Streymoynni**

FERÐSLA

*Orð & myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Tjørnuvík:** Tað er ein vanligur seinnapartur, ein sunnudag seinast í oktober mánaði í ár.

Við ferð er ein stórur klettur á veg oman Líðina og útá landsvegin, sum tjørnuvíkingar hava sum einastu farleið sína við umheimin.

Klokkan er 16:30 henda sunnudagin 29. oktober 2006, tá løgreglan ringir til økisformannin, Petur Eikholm í Hvalvík.

Í telefonini greiða teir honum frá, at fólk í Tjørnuvík hava boðað frá einum ógvuliga stórum kletti. Hesin var farin niður á vegin, hevur síðani brotið bilverjuna og lá nú niðanfyri vegin.

- Tað er sjáldan at soo stórir steinar koma oman á vegin. Men hesin, - hesin var rættiliga stórur, helst eini 15 tons tungur, sigur Petur Eikholm við Sosialin.

Royndirnar vísa, at serliga nógv grót kemur á vegin, tá frost verður avloyst av nógvum regni.

– Slíkar dagar er altíð grót á vegnum, sigur hann.

### Altíð steinar

Eitt av arbeiðsøkjunum hjá monnunum, sum til dagliga arbeiða hjá Landsverki, er at tryggja at fólk kunnu sleppa til og frá heimbygdum sínum.

Fyri íbúgvararnar í Tjørnuvík er hetta eisini av avgerandi týdningi. Uttan hetta vegasambandið var eingin annar møguleiki fyri at kunna fara til arbeiðis, skúla ella annað á øðrum staði.

Skipanin hjá Landsverki hevur tí verið, at teir koyra til bygdirnar í økinum fyri at vita, hvussu koyrilíkindini eru.

– Vit hava ta skipan, at hava vit minsta ánilsi av at kuldi ella hálka eru í luftini, so leggja vit til brots, ofta longu kl. 5 um morgunin.

– Her hyggja vit eftir, hvussu líkindini eru. Og er neyðugt at salta vegirnar, so kunnu vit byrja tað arbeiðið beinanvegin, tí bilurin hevur eina saltbússu við sær, greiðir Petur Eikholm frá.

Annars verður farið hvønn einasta morgun til Tjørnuvíkar fyri at vita, um nakað grót er dottið niður á vegin.

– Satt at siga, so er altíð onkur steinur at síggja á Tjørnuvíkarvegnum, sigur hann.

### Onnur støð

Hóast hesar umstøðurnar hjá tjørnuvíkingum so metir Petur Eikholm ikki at henda farleiðin er vandamiklari enn aðrar líknandi farleiðir.

Hann hugsar her um umstøðurnar sum m.a. viðingar, skælingsfólk, dalbingar og onnur fólk á eystursíðuni á Sandoynni liva undir dagliga.

Sjálvur fekk Petur ein rættiliga stóran stein á sín egna bil fyri nøkrum árum síðani.

Hetta var ikki á sjálvum Tjørnuvíkarvegnum, men longur suðuri millum Haldórsvík og Langasand, nærhendis Fossá. Steinur tók í kúfangaran, men gjørdi annars ikki ov stóran skaða.

Tað er eingin orsøk at vera bangin fyri at koyra her. Men ein skal sjálvandi hava størstu respektina fyri hesum vegastrekkjum, verður víst á.

### Hegna fyri gróti

Nógvar loysnir hava verið frammi um, hvat gerast skal við Tjørnuvíkarvegin.

Nógv ynskja sær helst ein tunnil. Eins og víst varð á í Sosialinum mánadagin hevur uppskot um tvær ymiskar tunnilsloysnir verið frammi.

Ein heilt onnur loysn, sum menn hava góðar royndir við í grannalandi okkara, Noregi, er eitt serstakt hegn at festa á støð, har nógv grót kemur oman.

Hetta er sjálvandi ein kostnaðarmikil loysn, men áhugi er kortini fyri at royna hetta hegnið á Tjørnuvíkarvegnum.

Mett hevur verið, at hetta vegastrekkið er mest hóskandi til eina slíka loysn, og tí koma menn úr Noregi at seta eitt slíkt hegn upp longu í vetur ella komandi vár.

Teir hjá Landsverki fara sjálvandi at luttaka í hesum arbeiðinum. So kunnu teir so líðandi sjálvir læra seg, hvussu ein kann seta slík hegn upp á øðrum støðum, har tað er neyðugt.



*Ein slíkur steinur kann gera stóran skaða. Tað hendi tíbetur ikki hjá Peturi Eikholm, økisformanni hjá Landsverki. Hann fekk henda steinin í kúfangaran ein dagin, hann koyrdi við Fossá*



*15 tons tungi steinurin hevði brotið fyri seg, tá hann fór út av vegnum. Teir hjá Landsverki vóru skjótir at umvæla skaðan á bilverjuna*

## Hvat sigur politikarin?

Hesa seinastu tíðina hava vit varpað ljós á umstøðurnar hjá tjørnuvíkingum at sleppa av bygdini.

Vit hava tosað við bygdarfólkið og hava hugt eftir onkrum fyrispurningi, sum hevur verið um hetta vegastrekkið fyri nøkrum árum síðani.

Í dag tosa vit við økisformannin hjá Landsverki. Í einum komandi blaði tosa vit við Heðin Zachariassen, sum bæði er borgarstjóri fyri Tjørnuvík og løgtingslimur í økinum.

Hansara partur liggur ikki eftir, tá talan er um at bøta um ferðaviðurskiftini hjá tjørnuvíkingum.